# Við El & Tele 27.000 kilometrar upp í luftina

**Samskiftisfyritøkan El & Tele hevur gjørt avtalu við bretska fyritøku um at veita tráðleyst internetsamband gjøgnum fylgisvein. Sostatt ber nú til binda deildir hjá fyritøkum saman við tráðleysum sambandi, og harafturat kunnu lítlar bygdir og oyggjar bindast bindast saman í felags net, sum síðani senda víðari til fylgisveinin í 27.000 metra hædd**

SAMSKIFTI
*Theodor E. D. Olsen*



*El & Tele á Argjum bjóðar nú eina nýggja tænastu við tráðleysum samskifti*

Møguleikarnir hjá føroyingum at útvega sær internetsamband mennast í hvørjum, og nú bjóðar samskiftisfyritøkan El & Tele á Argjaboðagøtu 7 á Argjum viðskiftafólki eina nýggja tænastu við tráðleysum interneti. El & Tele hevur nevniliga gjørt avtalu við General Technologies Ltd, ið heldur til í Oxford, um at veita føroyingum tráðleyst internetsamband og er nú einkarumboð í Føroyum fyri hesar tænastur.

Fyritøkan El & Tele hevur annars higartil bert verið før fyri at veitt tænastur í Havn og einum parti av Skálafjørðinum og Kollafirði, men av tí at El & Tele nú bert er annað lið til fylgisveinin Astra – 1. liðið er fyritøkan í Oxford – hevur tað frá mikudegnum, tá útgerðin varð tikin í nýtslu, einki at siga, hvar tú ert staddur í landinum. Internetsambandið hjá El & Tele gongur gjøgnum hendan fylgisveinin, og kemur sambandið tí úr 27.000 kilometra hædd og fer líka niður til Týsklands at venda tað stutta bilið, tað hevur at ferðast. Eisini eru møguleikar fyri øðrum samskiftishættum enn bert interneti í hesari skipan.

### Í samsvar við Landsstýrið

Rasmus Magnussen, stjóri á El & Tele, sum varð stovnað í 1999 og í dag hevur 20 fólk í arbeiði, er vælnøgdur við avtaluna, sum tey hava gjørt við bretsku fyritøkuna, og heldur hann, at møguleikarnir, sum internetsamband gjøgnum fylgisvein gevur, samsvara rættiliga væl við ætlanirnar hjá Landsstýrinum um, at allir føroyingar skulu hava atgongd til breiðbandsinternet við árslok næsta ár.

Umframt at lítlar bygdir ella oyggjar kunnu taka seg saman og útvega sær internetsamband í felag, so er hendan nýggja tænastan eisini ætlað fyritøkum, sum hava fleiri deildir kring landið og hava tørv á innanhýsis sambandi. Tað sama er galdandi við fyritøkum, sum hava deildir uttanlands og skulu samskifta innanhýsis á egnum neti. Tað einasta, ið krevst er, at signalið skal 27.000 kilometrar upp í luftina áðrenn.

### Veldst um tørv

Møguleikarnir eru nevniliga nógvir við fylgisveinasambandinum, og nevnir Rasmus Magnussen t.d. arbeiðsháttin hjá læknum, tá serkunnleiki verður veittur gjøgnum fjarskifti. Hetta kann eitt nú gerast við at biðja ein serfrøðing í New York fylgja við eini skurðviðgerð á Landssjúkrahúsinum, bert fyri at nevna eitt hugsað dømi. Harafturímóti er fylgisveinasamband ikki so væl egnað til telduspøl o.t.

Enn vil El & Tele ikki avdúka nakrar prísir á nýggju tænastuni. Hetta gera tey, bæði av kappingarávum, men eisini, av tí, av tí, at tað veldst um tørv, sum jú ikki er tann sami hjá einum privatum húski og einum virki við fleiri deildum.

Men Rasmus Magnussen vil tó vera við, at El & Tele er kappingarført og er ikki í sama mun áður bundið at netinum hjá Føroya Tele. Harafturat ger tað tráðleysa sambandið, at El & Tele hevur møguleika til at bjóða samskiftistænastur til viðskiftafólk uttanlands, og nevnir Rasmus Magnussen Ísland sum ein møguligan marknað. Í øllum førum spæla teinur og fjarstøða ikki so stóran leiklut í hesum tráðleysa fjarskiftissamskifti, sum bert skal finna sær leiðina upp til fylgisveinin, ið sveimar í erva.


## Húsavørður

**Hervið verður søkt eftir húsavørði til Sølumiðstøðina SMS.**

Dugnaligur maskinmeistari er í starvi. Hann hevur ábyrgdina av elkervinum, maskinum og tólum.
Títt starv verður at syrgja fyri, at SMS-bygningurin annars altíð er í góðum og bæriligum standi - innan sum uttan.

Vit rokna við at tú hevur gott handalag og kanst fremja flest allar umvælingar og ábøtur, sum ein virkin gerandisdagur krevur. Ein hóskandi handverkaraútbúgving er ein fyrimunur.

Starvið er fulltíðarstarv at setast sum skjótast, men vit bíða eftir tí rætta persóninum.
Løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

Ert tú ein nærlagdur persónur, sum dugur at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú vælkomin at søkja starvið sum húsavørður í SMS.
Skrivlig umsókn, sum verður viðgjørd í trúnaði, skal sendast til:

SMS
Postboks 1059
110 Tórshavn
att.: Hans Mortensen



## Krambafólk

**Søkt verður eftir krambafólki til Benetton í SMS.**

Starvið er eitt fulltíðarstarv, sum skal setast skjótast gjørligt.

Tað er ein fyrimunur, um tú dugur væl við fólki og ert fryntligur og fyrikomandi.

Løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

UNITED COLORS
OF BENETTON.

SMS
Postboks 1059
110 Tórshavn
att.: Noomi Welhe


PRIX

NR. 21 • FRÍGGJADAGUR • 31. JANUAR 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**Dømingin**

10 fólk – bæði menn og kvinnur – meta um avrikini hjá bólkunum í teimum seks innleiðandi umførunum. Tey skulu geva stig fyri hesar fimm tættir:

- Framførsla.
- Soloavrik innan sang og ljóðføri.
- Samanspæl ella programmering.
- Tónlistarligar dygdir yvirhøvur.
- Aðrar dygdir.

Dómararnir kunnu lata hvørjum bólki í mesta lagi fimm stig fyri hvørt av punktunum. Tað vil siga, at ein bólkur kann fáa í mesta lagi 250 stig.

# Skuggagestir til Prixið

**Til hvørt umfar eru 10 fólk hálvloyniligir gestir til Prix Føroyar tiltakið. Tey eru dómarar. Fyrireikararnir lata tey vera ónevnd og hava fult álit á, at tey eru før fyri at meta um avrikini hjá bólkunum**

DÓMARAR
*Eyðun Klakstein*



*Í Prix Føroyum sleppa allir dómararnir at siga sína hugsan, og øll stigini telja. Hetta hevur víst seg sum eina vælvirkandi skipan, sum flest øll eru fegin um, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prixnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Til hvørt av innleiðandi umførunum í Prix Føroyum eru 10 fólk, sum skulu hava eygu og oyru serliga opin.

Talan er um fólkini, sum døma í kappingini.

Fyrsta árið høvdu áhoyrarnir eisini ávirkan á úrslitið, men tað var skjótt, at fyrireikararnir góvu áhoyrarunum sekkin. Í staðin varð tað dómarabólkurin, sum eina og aleina skuldi meta um bólkarnar og løna teimum eftir bestu sannføring.

Soleiðis er eisini í ársins Prix-kapping. 10 dómarar eru til tey innleiðandi umførini, og teir gera av, hvørjir bólkar skulu víðari í kappingini.

Fyrireikararnir av Prixnum halda, at tað er best, at hesir dómarar eru ónevndir, og tí ber ikki til hjá tónleikarunum ella almenninginum at fáa upplýst, hvørji fólkini eru, sum døma.

– Vandi við at gera nøvnini á dómarunum almenn er, at so flytir fokus seg frá tónleikarunum og til dómararnar, og tað ynskja vit ikki. Harafturat rokni eg við, at tað hevði verið trupult at fingið góðar og kvalifiseraðar dómarar, um teir skuldu verið útstillaðir alment, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Prixnum.

### Mugu ikki tosa saman

Dómararnir døma hvør í sínum lagi. Teir hava hvør sítt skjal at útfylla um hvønn bólk, og hesi skjøl verða latin inn, tá ið allir bólkarnir hava verið á pallinum.

Dómararnir hava ikki loyvi at tosa saman, áðrenn teir geva stigini, og tað skal tryggja, at dómararnir siga sína hugsan uttan at vera ávirkaðir hvørjum øðrum.

Stigini hjá teimum 10 dómarunum verða tald saman, og so er úrslitið greitt.

– Hetta ger, at hvør einstakur dómari í grundini ikki kann heftast fyri tí samlaða úrslitinum, tí hann hevur givið síni stig, og tað er ikki kanska ikki rættiliga í samsvar við samlaða úrslitið, sigur Fróði Vestergaard.

Hann heldur, at royndirnar frá 20 Prix-kappingum siga, at hetta er besti hátturin at skipa dømingina, og útlendsku gestirnar halda eisini, at skipanin er góð.

– Eg haldi, at tey flestu hava verið nøgd við dømingina, og dómararnir hava fingið frið aftaná, tí eingin visti rættiliga, hvør dømdi hvørt kvøldið. Ein dómari kann lættliga fáa eina rúgvu av óvinum, tá ið hann ella hon eru liðug at døma allar kappinginar, og tí er eingin orsøk at stilla teir fram, heldur Prix-samskiparin.

### Alment aðrastaðni

Føroyingar hava seinastu árini havt møguleikan at fylgja fleiri donskum tónleikakappingum. Popstars er ein teirra, Melody Maker og Grand Prixið tvær aðrar, og nú er føroyingur eisini við í Stjerne for en aften.

Í øllum hesum kappingum og øðrum við er dómarabólkurin almennur. Øll vita, hvørji fólkini eru sum døma, og tey standa við sín dóm.

– Popstars og aðrar kappingar hava nakrar fáar dómarar, sum nýta tíð at tosa saman og at semjast. Eg haldi ikki nógv av hesi skipan, tí vanliga verður tað tann dómarin, sum dugir best at tosa fyri sínari søk, sum vinnur kjakið, heldur Fróði Vestergaard.

– Í Prix Føroyum sleppa allir dómararnir at siga sína hugsan, og øll stigini telja. Hetta hevur víst seg sum eina vælvirkandi skipan, sum flest øll eru fegin um.

### Krevja at vera ónevndir

Dómararnir hava avgerandi orðið at siga í Prix Føroyum. Tónleikarar venja í vikuvís og fáa síðani ein dóm, sum teir mugu góðtaka. Hevði tað tí ikki verið rímiligt, at nøvnini á dómarunum vóru almenn, og at teir stóðu við sín dóm?

– Vit liva í einum lítlum landi, og tað eiga vit at taka fyrilit fyri. Tað er trupult at finna væl kvalifiseraðar dómarar, og fleiri krevja beinleiðis at vera ónevndir. Um fólk vistu, hvørji dómararnir eru, kundu teir skjótt verðið órógvaðir av fólki, sum ynskja at ávirka dømingina, heldur Fróði Vestergaard.

– Vit siga vanliga, hvørjar førleikar dómararnir hava, so eingin er í iva um, at tað eru fakfólk, ið døma. FUT, Útvarpið, Sjónvarpið og Norðurlandahúsið velja dómararnar, og tað eru fólk, ið hava innlit í tónleik og eru opin fyri øllum tónleikastílum.

Í finaluni eru tað vanliga fleiri útlendskir dómarar, og tá er talið á dómaraskarinum eisini nógv hægri enn til innleiðandi umførini. Fyri tveimum árum síðani vóru 26 dómarar í finaluni, og talið fer at líkjast hesum aftur í ár.